# Baugur-felag í trupulleikum

Bretska handilsketan MK One, sum íslendska Baugur Group eigur, hevur verið í fíggjarligum trupulleikum í seinastuni, skrivar blaðið The Times. Blaðið veit at siga, at fleiri heilsølur hava sýtt fyri at lata handilsketuni vørur, tí tær fáa ikki pengar fyri vørurnar. Sambært The Times hevur MK One nýliga goldið fyri vørur, sum ketan fekk upp undir jólahandilin í fjør. 172 handlar eru í ketuni, sum hevði góðar 200 mió. krónur í halli í fjør.



*Formaðurin í Baugur Group, Jón Ásgeir Jóhannesson, hevur nóg mikið at hugsa um (Mynd: Vísir)*

# Størri tørvur á arbeiðsmegi

Sum er tørvar byggivinnuni í Grønlandi umleið 800 fólk afturat, og sambært formanninum í IA, Kuupik Kleist, verður tørvurin uppaftur størri tey næstu árini. Við Sermitsiaq sigur hann, at í hesum tíðum leggur Grønland stóran dent á at menna námsvinnuna, og tað fer at krevja fleiri arbeiðsførar hendur. Harafturat kemur tann risastóra verkætlanin hjá Alcoa, og verður hon veruleiki, fær Grønland ein stóran trupulleika um nøkur ár, sigur Kuupik Kleist.



*Nýggjar uppgerðir vísa, at USA ikki longur hevur heimsins stórsta útlát av $CO_2$. Ivasama heiðurin hevur Kina nú fingið*

# Allar fyritøkur skulu gera veðurlagsroknskap

**Bert 17% av donskum fyritøkum hava sett sær ítøkilig mál fyri, hvussu nógv tær vilja avmarka sítt $CO_2$ útlát. Men allar fyritøkur skulu hava sín veðurlagsroknskap, stendur tað til serligu veðurlagsnevndina hjá donsku stjórnini. Hvussu er støðan í Føroyum?**

VEÐURLAGSROKNSKAPUR
*Finnur Sivertsen, Búskaparfrøðingur*
*bs@post.olivant.fo*
*Business-line*
*www.bl.fo*

Sambært serligu veðurlagsnevndini hjá donsku stjórnini eiga allar danskar fyritøkur at gera veðurlagsroknskap og leggja eina strategi fyri, hvussu tær minka um $CO_2$ útlátið. Hetta skal verða við til at vísa øllum heiminum, at Danmark er heilt frammi í oddinum, tá tað snýr seg um umhvørvistøkni.

Uppskotini hjá nevndini eru lið í eini verðurlagsstrategi, sum stjórnin fer at leggja fram í komandi í ár.

### Ráðstevna um veðurlagsroknskap

Stóra danska ráðgevingarfelagið, FORCE Technology, skipar í komandi mánað fyri eini ráðstevnu, kallað Carbon Footprint Arrangement, har fyritøkurnar kunnu fáa innlit í, hvussu ein veðurlagsroknskapur verður gjørdur.

Á hesi ráðstevnu verður serligt ljós varpað á avbjóðingar, ítøkilig amboð, tiltøk til umhugsunar og ikki minst, hvørjir trupulleikar kunnu taka seg upp í sambandi við íverksetan av eini veðurlagsstrategi.

Tiltakið er serliga ætlað kommunum og vinnulívi, sum í alt størri mun leggja seg eftir at kanna, í hvønn mun vørur, framleiðslur, mannagongdir og rakstur ávirka veðurlagið.

Tvinnar høvuðsorsøkir eru fyri at gera veðurlagsroknskap:

### 1. Umdømi og trúvirði

Viðskiftafólk, starvsfólk, fjølmiðlar og tað almenna vænta í alt størri mun, at fyritøkurnar eru førar fyri at grundgeva fyri, í hvønn mun tær ávirka veðurlagið, serliga $CO_2$ útlátið. Kunnu tær leggja fram ein veðurlagsroknskap, er tað tekin um opinleika og trúvirði, og at fyritøkan tekur sína part av ábyrgdini av at skapa betri veðurlag í heiminum.

### 2. Útreiðslusparing

Veðurlagsroknskapurin vísir, hvussu fyritøkan og tess vørur ávirka veðurlagið og gevur harvið hentar upplýsingar um, hvørji tiltøk verða sett í verk til tess at minka um avleiðingarnar av útláti og á tann hátt spara pening.

### Føroyar og veðurlagsroknskapur

Føroyar hava nýliga verið vertur fyri veðurlagsráðstevnu, har millum onnur fyrrverandi varaforsetin í USA umrøddi ta ávirkan, ið veðurlagsbroytingar hava havt tey seinastu árini og ta vanlukku, ið kemur at standa av, um allar heimsins tjóðir ikki standa saman um at verja umhvørvið.

Í kjalarvørrinum eftir hesa veðurlagsráðstevnu hevði verið eitt gylt høvi hjá Føroya Landsstýri at meldað greitt út, um Føroyar ætla at liva upp til altjóða ásetingar um $CO_2$ útlát ella ikki.

Føroyski búskapurin er framvegis soleiðis háttaður, at tað er útlendskur eftirspurningur (eftir fiskavørum), ið avger, hvørjum standi hann er í.

Dagurin er kanska ikki so langt burtur, tá útlendskir keyparar av føroyskum vørum krevja veðurlagsroknskap við skjalfesting um $CO_2$ útlát.

Talan er tí um eitt álvarsmál, ið føroyskir myndugleikar saman við vinnuni ikki sleppa undan at taka støðu til.